# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Rusland - ein týðandi marknaður

Føroyar hava gamla siðvenju fyri handilssambandi við Rusland. Heilt afturi í Sovjettíðini knýttu føroyingar handilslig sambond við hetta risastóra landið, ið gjørdist ein hin týdningarmesti sildamarknaður okkara. Í teimum kreppukendu fimtiárunum var hesin marknaður eitt høvuðsálitið hjá føroyskum útflytarum, sum funnu ein góðan og álítandi marknað í Sovjetruslandi og øðrum eystureuropeiskum londum. Nógv er broytt hesi árini síðan múrurin fall, men Rusland er framvegis ein marknaður við sera stórum møguleikum fyri føroyskar útflutningsfyritøkur.

Tað er tí av sera stórum týdningi at halda lív í sambandinum við henda stóra og týðandi marknað. Tað er tískil gott og áhugavert, at vit í hesum døgum hava vitjan av umboðum fyri russiskar fyritøkur og fyri hitt almenna Russland. Endamálið við vitjanini er at knýta fleiri og tættari bond millum fyritøkur í londunum. Hetta kann bert vera føroyskum vinnulívi at gagni og øll, sum hava eitt sindur av royndum innan handil og útflutingsvinnu vita, hvussu stóran týdning tað hevur persónliga at hitta áhugaðar keyparar og komandi samstarvsfelagar.

Tað er Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, ið hevur tikið stig til vitjanina, og hann sigur endamálið vera at menna samvinnu og vinnuligt samstarv millum føroyskar og russiskar fyritøkur. Í russiska ferðalagnum eru umboð fyri russiska vinnu, ein serfrøðingur í menning av fiskiídnaði og ein embætismaður av russisku sendistovuni í Keypmannahavn. Meðan ferðalagið er í Føroyum, fær tað høvi at hitta umboð fyri føroyskar vinnufyritøkur, ið hava hug at byrja samvinnu við russiskar fyritøkur ella styrkja og menna samstarv, ið longu er. Gestirnir fara á fund við umboð fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag. Eisini verður vitjað í havnum, har samvinna longu er við russar. Fundur verður harumframt við landsstýrismannin í vinnumálum, eins og løgmaður fer at nýta høvið at heilsa upp á gestirnar. Vinnumálaráðharrin leggur dent á týdningin av Ruslandi sum útflutningsmarknað. Vakstrarmøguleikarnir eru stórir, tí í Russlandi búgva næstan 150 milliónir fólk. Har er nógv at fara eftir hjá dugnaligum fyritøkum. Lykilin er at finna góðar samstarvsfelagar, sigur vinnumálaráðharrin.

Tað er einki at ivast í, at føroysk vinna hevur nógv áhugavert at bjóða Ruslandi. Vit hava hentleikar í okkara havnum, vit hava tær vørur, ið skipunum tørvar og vit eru millum tey fremstu, tá talan er um framkomna og dygdargóða fiskivinnutøkni. Hvat kunnu vit so við fyrimuni keypa úr Ruslandi? Svarið hjá Vinnumálaráðnum er t.d. olja, sum vit ivaleyst við stórum fyrimuni kunnu innflyta úr Ruslandi. Rusland er eisini áhugavert í ferðavinnuhøpi og sum onnur dømi um samstarv verður nevnd havgransking sum eitt upplagt evni. Tað er at vóna, at vitjanin hjá russisku sendinevndini fer at føra til øktan samhandil og økt samstarv millum risaveldið fyri eystan og lítla oyggjalandið í útnorði. Russiski aðalkonsulin í Føroyum hevur gjørt eitt megnar arbeiði fyri at knýta bond, og aðrir hava fylgt eftir.

**Sosialurin**

## Rættleiðingar til tíðargrein um alduorkuverk



**ÓLAVUR GREGERSEN**
stjóri, P/F Sewave

Í Sosialinum 15/5-2009 var tíðargrein um **Alduorkuverk við Nípuna í Miðvági**, skrivað av Gunnar R. Nattestad, maskinmeistara, Miðvágur.

Í hesum sambandi skulu rættleiðingar gerast til tey mest týðandi ítøkiligu viðurskiftunum við alduorkuverkætlanini, sum verða umrødd.

Fyrst er at siga, at Sewave hevur havt fundir við Sands- og Vága Kommunur fyri at kunna um verkætlanina. Harumframt hevur kunnandi fundur verið við ognarar og festarar av Nípuhaga. Sewave bíðar nú eftir at frætta frá hagastýrinum, um ognarar eru sinnaðir at lata lendi til vegagerð til tunnilsinntakið. Um so er, verður søkt um byggiloyvi frá avvarðandi myndugleikum. Um ognarar ikki eru sinnaðir at lata lendi, so verður ikki farið víðari við verkætlanini á Vágoynni.

### Endurgjaldsmetingar

Búnaðarstovan hevur vegleiðandi endurgjaldsmetingar í sambandi við keyp ella leigu av lendi í haga. Við støði í hesum verður endurgjald latið ognarum – antin talan verður um keyp ella leigu av lendi.

### Aldumátingar

Mett er um alduorkuna við Nípuna við grundarlagi í einum alduatlasi, grundað á fýra mátarar síðani 1979, umframt ítøkiligar mátingar sunnanfyri, saman við metingum frá turbinuframleiðara.

### Jarðfrøðin

Í sambandi við staðbundnar kanningar hevur Jarðfeingi mett um jarðfrøðina í Nípubergi. Metingin er, at jarðfrøðin er sera væl egnað til verkætlanina. Serfrøði og royndir innan tunnilsgerð bæði í fjøllum og undir havi geva onga orsøk til at at óttast omanlop e. a. av arbeiði, sum skal gerast inni í fjallinum.

### Vegur og ferðsla

Ætlanin er at gera ein 4 metur breiðan veg, sum verður lagdur eftir lendinum, eins og tann gøtan, sum í dag liggur í økinum. Hetta er at meta við ein sokallaðan uppdyrkingarveg, sum ikki er ætlaður til ferðslu sum so. Um hagastýrið ynskir tað, kann portur setast á vegin. Ferðslan í sambandi við orkuverkið er avmarkað til viðlíkhald og eftiransan nakrar ferðir um mánaðin.

### Verkið sjálvt

Talan er um eitt royndarverk. Í tí sambandi verða ymisk mátitól set upp. Tó verður ikki talan um at hava skrivstovu e.l. úti í Nípuni. Hesi tól verða fjarlisin av teimum, sum koma at arbeiða við úrslitunum av royndini. Um royndin eydnast væl, er grundarlag fyri at umhugsa, um fleiri líknandi verk skulu gerast

### Verkætlanin

Uttan at fara í smálutir skal verða kunnað um, at verkætlanin byggir á sera djúptøknar útrokningar og royndir í aldubrunnum í skalastødd. Tey feløg, sum standa fyri hesum arbeiði, eru Dresser-Rand Company Ltd., Converteam, Orecon, Queens University í Belfast og Unversity College Cork í Írlandi. Til ber at kunna seg nærri um hesi feløg og lærdar háskúlar á alnetinum. Innan altjóða alduorku verða hesi mett at vera millum tey fremstu. Hetta er eisini ein orsøk til, at ES hevur mett verkætlanini so mikið áhugaverda, at sáttmáli er undirskrivaður um stuðul upp á meira enn 10 mió. kr.

### Orkuframleiðsla

Sewave hevur eyðmerkt uml. 50 km av bergi í Føroyum, sum eru hóskandi til hetta slagið av alduorku. Um roknað verður við, at í minsta lagi 10% av hesi longd kann gagnnýtast effektivt, (tvs. 5 km), so kunnu umleið 150 GWh framleiðast árliga. Hetta tal svarar til meira enn 50% av samlaðu orkuframleiðsluni hjá SEV í dag, og meira enn hálva aðru ferð vatnorkuframleiðsluni hjá SEV.

### Orkutørvur

Veðurlagsbroytingarnar viðføra avbjóðingar, sum gera, at føroyingar mugu menna og gagnnýta so nógva varandi orku sum møguligt. Tí er neyðugt at nýta allar møguleikar, sum eru viðkomandi í Føroyum. Jarðfeingi staðfesti í síni ársfrágreiðing, at samlaða orkunýtslan í Føroyum í 2006 var 2.800 GWt. Herav var orkunýtslan á landi uml. 1633 GWt. Málsetningurin í almenna orkupolitikkinum er, at í 2015 skulu 20% av orkunýtsluni á landi stava frá varandi orku. Hetta svarar til meira enn 325 GWt um árið.

SEV hevur sum minstamál, at parturin frá varandi orku verður 55% í 2015. Samlaða orkunýtslan hjá SEV er 270 GWt, herav vóru í 2008 umleið 40% ella 100 GWt frá vatni og vindorku. Men SEV roknar við einum vøkstri upp á 2% um árið í orkunýtsluni, og hetta inniber, at um málsetningurin um 55% skal náast, so skal framleiðsan av varandi orku økjast við 60 GWt innan 2015.

Í frágreiðingini "Skjótt syftir seiðir", sum Umhvørvisstovan og Innlendismálaráðið góvu út í 2008, verður sagt, at í framtíðini er ógvuliga sannlíkt, at ferðsla á landi kann verða rikin við elorku ella vetni. Tað ber í sær, at nærum allur orkutørvurin á landi kann verða nøktaður við elmegi. Um allur orkutørvurin skal nøktast, so svarar tað til 1600 GWt. Í dag framleiðir SEV umleið 17% av hesum. Tí er ikki talan um td. annaðhvørt aldu ella vind, men heldur verður neyðugt at byggja út við øllum teim varandi orkukeldum, sum vit kunnu gagnnýta í Føroyum, tað veri seg vindi, sjóvarfalli, sól og alduorku.

### Altjóða týdning

Føroyar kunnu við hesari verkætlan gerast undangonguland innan menning av hesum slagnum av alduorku, og harvið eru vit eisini við til at gera okkara íkast til at loysa tær globalu avbjóðingarnar, sum veðurlagsbroytingarnar viðføra. Við alduorkuverkætlanini hjá Sewave fær føroyska samfelagið ein møguleika at menna ein serkunnleika, sum kann bera í sær samstarvs- og vinnumøguleikar uttanlands.

Sewave hevur boðað Vága Kommunu og ognarum frá, at felagið fegið vil kunna meira um verkætlanina á almennum fundi, er ynski um tað. Annars verður víst til heimasíðuna www.sewave.fo, har fleiri upplýsingar eru um verkætlanina.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.